### Til luttakararnar í projektkappingini um bygging av nýggjari kirkju á Argjum

# Broytingar í kappingini

Eftir ynski frá kirkjuligu myndugleikunum eru broytingar gjørdar í samband við kappingina um nýggja kirkju á Argjum.

Nakrar høvuðsbroytingar eru framdar í sambandi við kappingina. Tær eru nevndar niðanfyri. Aðrar útgreiningar ella broytingar kunnu verða gjørdar í sambandi við svar uppá spurningar, sum skuldu fyriligið 12. mai.

## Útsetan av kappingini

Innlatingarfreistin er broytt til 1. september 2015.

Freistin fyri at lata inn spurningar er broytt til 5. mai 2015.

## Broyting av dómsnevnd og ráðgevararum

Bergur Debes Joensen, prestur, verður ein av dómarunum í kappingini.

Samstundis fer Valbjørn Dalsgarð úr dómsnevndini, og verður í staðin ráðgevari hjá dómsnevndini.

## Fíggjarligir karmar

Vart verður gjørt við, at fíggjarligu viðurskiftini eru partur av metingargrundarlagnum hjá dómsnevndini.

Gjørligt skal vera at byggja kirkjuna innan ein fíggjarligan karm ásettan av kirkjumyndugleikunum. Hesin karmur er 40 mió kr. fyri bygging og lendisarbeiði og íroknað útreiðslur til projektering og byggieftirlit og aðrar veitingar frá ráðgevara.

Kravt verður ikki, at kostnaðarmeting verður latin inn saman við uppskotunum. Men um valdar eru loysnir í eitt nú innrættan ella konstruktiónir, sum kunnu vera ringar at meta um, er tað ábyrgdin hjá uppskotssetaranum at hava gjørt sannlíkt, at uppskotið kann halda seg innanfyri fíggjarliga karmin.

Dómsnevndin kann í meting sínum av uppskotum nýta uttanhýsis ráðgevarar í sambandi við fíggjarviðurskifti.

Ein endalig avtala um projektering av nýggju kirkjuni vil eisini vera tengd at byggikostnaðinum, sambært vanligum treytum fyri ráðgevaraavtalum.

Vegna kirkjuráðið á Argjum

Tórálvur Weihe, kappingarskrivari